## DAGSINS MEINING

# Neyðarróp frá løgmanni

Valstríðið til løgtingið er byrjað. Løgmaður skjeyt startskotið, tá hann í farnu viku gjørdi av at avlýsa yvirtøku av flogvøllinum. Í ÚF fekk løgmaður tað at ljóða sum eina náttúrliga reaktión uppá úttalilsi hjá donskum embætismanni á flogvøllinum, ið metti, at fullveldisgongdin hevði steðgað útbygging av flogvøllinum.

Ein marghátttlig reaktión/yvirreaktión frá løgmanni, tí hvussu kann løgmaður stegða einum máli, ið hansara flokkur hevur lagt so stóra orku í at fáa loyst – bara út frá úttalilsi frá embætismanni! Einki nýtt var í hansara orðum. Tey eru søgd fyrr av sama manni. Tá fór løgmaður ikki upp á bakbeinini, kanska tí tað ikki var so neyðugt sum nú, har flokkurin stendur til at missa mannin í Vágoynni. Vit siga ikki, at løgmaður á henda hátt misbrúkar sín sess, men vit seta tó spurningin, hvussu tað ber til, at hann reagerar eftir fólkatingsvalið, tá hann kundi gjørt tað fyri langari tíð síðani?

Hyggja vit at valúrslitinum í Vágum, er greitt, at valdømið er ein av Akilleshælunum hjá Fólkaflokkinum til løgtingsvalið. Beint ímóti øllum metingum fekk flokkurin ein dyggan frammaná í tí valdømi hann sigur seg hava gjørt so nógv fyri. Hvussu ofta hava vit ikki hoyrt J. Niclasen taka sær æruna av tunlinum, og nú eisini flutt Skipaeftirlitið í oynna. Aftrat hesum hava partamenn hansara arbeitt við at fáa flogvøllin á føroyskar hendur. Samanumtikið - skuldi man trúð - ein idell støða hjá flokki at vinna sær sess aftur. Men gakk – Sambandið fór við stórum parti av atkvøðunum.

Fólkaflokkurin hevur fingið at merkja, hvat tað vil siga, fyrst at spæla út sum loysingarflokk fyri síðani at trekkja í land aftur. Í fyrsta lagi hevur hann stygt sínar sambandshugaðu veljarar, og teir eru ikki so fáir í Vágum, og í øðrum lagi hevur hann fingið øði í sínar fullveldissinnaðu veljarar, ið eru rýmdir í Tjóðveldisflokkin. Ein ring støða hjá einum flokki at vera í. Og tað kann vera tí, at løgmaður nú roynir at bjarga stumparnar. Men tað er eingin løtt uppgáva, tí hvat hann enn fyritekur sær, missir hann antin til Sambandið ella til Tjóðveldið. Læran hjá flokkinum átti at verið ikki at lata seg »lumpa« út á djúpt vatn, tí tá melda sambandshugaðu veljarar floksins frá. Løgmaður hevur síðani roynt at geva fólki fatan av, at hann er sinnaður fyri tí loysn Javnaðarflokkurin hevur staðið fyri. Men so hendi tað marghátttliga, at Óli Breckmann á landsfundi í Klaksvík meldar katastrofalt út, at Tjóðveldisflokkurin er mest sannlíki samstarvspartnarin eftir eitt løgtingsval. Og Óli, ið øll kenna sum fødda taktikaran. Pladask. Verri men tó ærligari kundi tað ikki verið sagt.

Um hetta seinasta »trekk« løgmans kann bjarga manninum í Vágum fáa vit at síggja. Men tá má flokkurin fyrst eta í seg aftur samtyktina um samstarv við Tjóðveldisflokkin. Og væl tað. Alternativið kann gerast, at verandi samgonguflokkar gerast ov stuttir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bankamálið og teir politsku flokkarnir

**Edmund Joensen**



Í einum valstríði er soðið ofta tunt, serliga hjá teimum loysingarsinnaðu.

Til fólkatingsvalið hesaferð kappaðust serliga Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin um at fortelja fólkinum hvussu raskir teir vóru í bankamálinum – væl at merkja í 1998, tá alt í grundini var yvirstaðið.

Fólkaflokkurin vil vera við, at teir við teirra einastandandi samráðingarsnildi eiga alla æruna.

Javnaðarflokkurin er sannførdur um at ein stuttur fundur ímillum føroyska og danska javnaðarflokkin gav hesum flokki allan heiðurin.

### Hvat var tað sum veruliga hendi?

8. juli 1994 gjørdist Sambandsflokkurin størsti flokkur á løgtingi og skipaði landsstýri saman við Javnaðarflokkinum, Verkamannafylkingini og Sjálvstýrisflokkinum. Sambandsflokkurin hevði leiðsluna í landstýrinum.

Áðrenn tað høvdu føroysk landstýrir ferð eftir ferð skriva undir og niðurbundið føroyingar. Undanfarin landstýri høvdu í skrivligum avtalum bundi føroyingar til alla skuldina, og stórtsæð góðtikið øll donsk harraboð, uttan so mikið sum at hugsað seg um – og uttan á nakran hátt at vera raskir.

Nýggja sambandslandsstýrið frá 1994 kravdi á fyrsta fundinum við donsku stjørnina bankamálið aftur á dagsskrá. Hetta kom óvart á, og tvørt fyri hjá dønum, tí teir hildu seg annars vera slopnar. Men málið var ríkismál, og tí áttu føroyingar ikki einsamallir at hanga uppá bankaskuldina. At vit kortini skuldu bera okkara part av bankaskuldini er bert ein sjálvfylgja.

### Politisk loysn

Mín egna støða var frá fyrsta degi, at málið skuldi loysast sum eitt politiskt mál. Málið endaði eisini við eini polittiskari loysn, bert fleiri ár seinni enn neyðugt. Orsøkin til seinkanina var fyrst og fremst, at stórur partur av føroyskum politikarum, sóu fyri sær eina stevning, eina juridiska uppgerð, eftir endurgjaldi frá danska statinum.

Teir politikarar sum høvdu rópt harðast upp um sakarmál, teir sum róptu krossfest, krossfest, teir tagnaðu so hvørt sum teir lósu síðu fyri og síðu eftir í drúgvu frágreiðingini frá bankakanningini. Føroyingar høvdu eina sera vánaliga juridiska sak, fyri ikki at siga onga. Tað kemur eisini so týðuliga fram í bankakanningini.

Tað má sigast at verað ein Guðs lukka, at stevningin ikki bleiv til veruleika. Tá høvdu teir fingið dóm fyri, at føroyingar einsamallir skuldu gjalda fyri sín egna kleyvarskap.

### Danska stjórnin

Rætt skal vera rætt. Aftaná at okkara loysingarsinnaðu høvdu seinkað málinum í ár og mánaðir, valdi danska stjórnin, sum væl dugdi at síggja, at teir áttu sín lut í trupulleikunum innan felagsmálið bankamál, pengamál v.m., at bíða eftir føroyska løgtingsvalinum, sum teir roknaðu við at fáa ávísar fyrimunir av. Stóru plakatirnar í Føroyum søgdu jú frá nýggja løgmanninum í Føroyum. Men mongum brestur ætlan, Javnaðarflokkurin, sum hevði slitið fyrru samgonguna (frá 1994), slapp ikki við í nýggju samgonguna í 1998.

Mogens Lykketoft til Føroya

Beint eftir at núverandi loysingarlandstýrið var skipað, gjørdi Mogens Lykketoft fíggjarmálaráðharri eina ferð til Føroya. Við sær í sjáttuni hevði hann uppskot til sjálvan avhendingarlistan av bankamálinum. Tað var týðuligt, at nú vildi danska stjørnin hava bankamálið út av verðini sum skjótast.

### Uttanlandsnevndin

Uttanlandsnevndin gjørdi sítt tilmælið, sín spísiseðil til endaligu samráðingarnar við donsku stjórnina. Minnilutakrøvini frá umboðum Sambandsflokksins komu sjálvsagt at samsvara best við endaliga úrslitið. Sjálvandi tað, tí vit høvdu fyrireika og vit vistu alt um málið, bæði úr Føroyum og úr Danmark.

Viðgangast má, at ikki øll krøvini frá okkara umboðum vórðu uppfylt. Útbyggingin av Vága floghavn og ymisk onnur mál vórðu slept av nýggja loysingarlandstýrinum, av heimligum politiskum grundum.

### Tá tikið verður samanum

Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin, sum upp undir fólkatingsvalið royndu at kókað tunna súpan uppá bankamálið, mega smyrja seg við teirra veruliga leiklut í hesum máli.

Báðir flokkarnir søgdu ja til tær mannminkandi avtalurnar sum skuldarbundu føroyingar, uttan at hugsa um at krevja at danir luttóku við teirra sjálvsagda luti. Ein kann við fullum rætti siga, at teirra flokkar mistu kalvan tá ið málið byrjaði. Teir kravdu síðan juridiska uppgerð við danir um bankamálið. Um hetta gjørdist verunleiki vóru allir møguleikar at fáa kalvan innanborða horvnir fyri allar tíðir.

Tað eydnaðist Sambandsflokkinum, sum kravdi og fekk bankamálið aftur á dagskrá at bjarga Føroyum undan at hanga uppá danska partin. Vit í Sambandsflokkinum fingu sama kalvan, sum loysingarmenn høvdu mist, at býta á aftur.

Tá íð núsitandi landstýrið tók við, var bankamálið klárt at avgreiða. Málið var væl og virðiliga fyrireikað. Kalvin, lá beint undir borðið, stórur og tungur, men útlúgvaður, klárur at taka inn.


**Sosialurin**

Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo

**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

Viðmerkingar frá Føroya Tele:

# Fjarskiftisprísir og kapping

**Andras Róin, stjóri**
*Føroya Tele*



Landsstýrismaðurin í Vinnumálum hevur lagt upprit fram um ein føroyskan vinnupolitikk til aðalorðaskiftið í Løgtinginum. Í hesum sambandi hevur Fjarskiftiseftirlitið gjørt eitt hjárit, ið nevnist "Støðumynd av føroyska fjarskifitsmarknaðinum og samanberingar við onnur lond". Í hesum hjáriti, sum inniheldur nakað av taltilfari, verður m.a. gjørt upp, at ein samrøða, sum er í 3 minuttir á GSM kervinum hjá Føroya Tele um dagin, kostar 93 % meira enn ein samsvarandi samrøða í Danmark.

Samstundis hevur Fjarskiftiseftirlið latið Vinnumálastýrinum eitt tilmæli um m.a. at áleggja Føroya Tele at lækka hámarks-GSM prísirnar, men her við tí grundgeving, at Føroya Tele sambært sínum sundurskilda hálvársroknskapi, hevur eitt týðandi yvirskot á GSM virkisøkinum!

### Neyðugt og gott politiskt átak

Tað er positivt, at Vinnumálastýrið hevur tikið stig til eitt aðalorðaskiftið á Løgtingi um ein KT-vinnupolitikk, og tað uppskotið sum stýríð hevur gjørt í hesum sambandi inniheldur nógv gott og upplýsandi tilfar til víðari viðgerð. At Føroya Tele ikki er samt í øllum sjónarmiðunum, sum eru í uppskotinum, er kanska natúrligt.

Tað kundi eisini verið positivt, um "Støðumyndin" sum Fjarskiftiseftirlitið hevur evnað til, innihelt sakligar og relevantar (týðandi) samanberingar millum støðuna í Føroyum og í øðrum londum, til gagns fyri politisku viðgerðin. Soleiðis er tíanverri ikki, og skal Føroya Tele niðanfyri við nøkrum fáum dømun greiða frá hesum.

### Viðmerking nr. 1

Fjarskiftiseftirlitið er "Regulerandi myndugleikin" í okkara grannalondum. Føroya Tele vitandi hevur tað ikki hent seg í okkara grannalondum, at regulerandi myndugleikin hevur blanda seg uppí prísáseting fyri fartelefoni (GSM). Hetta av tí einføldu orsøk, at bert óttin fyri slíkari innblanding vildi forða fyri framtíðar íløgum hjá fjarskiftisveitarunum, og harnæst út frá tí grundsjónarmiði, at ein myndugleiki ikki eigur at blanda seg upp í kappingina við prísásetingum á frælsisgjørdum økjum. Tað er tíanverri neyðugt at minna Fjarskiftiseftirlitið á, at tveir kappingarneytar hjá Føroya Tele, longu fyri 1 ári síðani fingu loyvi at byggja upp millum annað fartelefonkervi, eins og hesar alla tíðina, hava havt tann møguleikan at nýta kervi hjá Føroya Tele.

*Høvdu t.d. Dimmalætting ella Sosialurin gjørt íløgur í nýggjari tøkni / prentsmiðjuútgerð, um so at vandi var fyri at ein myndugleikin dikteraði lægri blaðprís?*

### Viðmerking nr. 2

Fjarskiftiseftirlitið hevur í meira enn eitt hálvt ár noktað Føroya Tele at seta í verk ymiskar avsláttarskipanir, hóast kappingarneytarnir hjá Føroya Tele beinanvegin fingu loyvi til hetta.

*Kunnu vit ímynda okkum, at øll bløð í Føroyum fingu loyvi at gera fasthaldsskipan við avsláttrum uttan t.d. tað størsta ?*

At so Fjarskiftiseftirlitið, í samband við "Støðumynd", samanbera "Standardhald" hjá Føroya Tele við "Avsláttarskipanir" í øðrum londum er ikki sørt undrunarvert.

### Viðmerking nr. 3

Meginreglur hjá "regulerandi myndugleikum" í okkara grannalondum er millum annað at, reguleringin skal verða: gjøgnumskoðilig og rættvís (parallellitet) og skal grundast á royndir og taltilfar yvir eitt longri tíðarskeið.

Fjarskiftiseftirlitið skiftir grundgevingar fyri sínar avgerðir og sínari uppílegging frá viku til viku, soleiðis at ikki ber til hjá millum annað Føroya Tele at planleggja ella tryggja haldgott grundarlag fyri ítøkiligar virkis- ella íløguætlanir.

Fjarskiftiseftirlitið er ikki rættvíst og vísir ikki "parallellitet", tí tað millum annað í samband við avsláttarskipanir stillar Føroya Tele verri fyri enn kappingarneytarnar.

Fjarskiftiseftirlitið hevur ikki royndir og heldur ikki taltilfar, sum kann lýsa eitt longri tíðarskeið og bera avgerðir tess tískil brá av tilvild. At Fjarskiftiseftirlitið yvirfyri Vinnumálastýrið kann tilmæli lægri hámarksprísir fyri GSM, bert grundað á hálvársroknskapin frá Føroya Tele fyri 2001, sigur einki um úrslitið árið fyri ella næsta ár. Fyri Føroya Tele er tað sjálvsagt alneyðugt, at positivt úrslit er á einum virkisøki, tá ið íløgur standa fyri framman.

*Kunnu vit ímynda okkum, at eitt blað ella ein handil av einhvørjum slag, aftaná ein góðan jólamánaða, fekk boð um at seta prísirnar niður í januar mánaða ?*

### Støðumynd Fjarskiftiseftirlitsins

Taltilfar og samanlíkningar millum fjarskiftisveitarir og kundaprísir innanfyri og upp á tvørs av londum, er avgjørt nakað, sum skal gerast. Føroya Tele roynir støðugt at samanbera okkum við aðrar veitarar, bæði hvat viðvíkur tænastuútboði, tænastudygd og prísir. Hetta slagið av "benchmarking" er neyðugt til tess at Føroya Tele fær optimera tænasturnar og prísirnar, samstundis sum Føroya Tele kann tryggja skynsaman og framtíðartryggan rakstur av fyritøkuni.

Tá ið Fjarskiftiseftirlitið í sínari "Støðumynd" kemur fram til nakrar niðurstøður um prísleguna innan fjarskiftið í Føroyum, er í stóran mun talan um, at Fjarskiftiseftirlitið samanber perur við appelsinur.

### Viðmerking nr. 4

Tá ið Fjarskiftiseftirlitið roknar seg fram til, at GSM er 93 % dýrari í Føroyum enn í Danmark, so er samanberingin gjørd millum eitt serligt tilboð hjá Tele-2, sum ikki hevur egið kervið; sum bert hevur 0,6 % av danska marknaðinm og sum samstundis hevur aðrar treytir lagdar við haldinum. Eitt vanligt "standard" hald hjá t.d. Sonofon kostar um dagin 1,95 pr minutt, meðan Føroya Tele tekur 2,15 pr. minutt. Harafturat kemur, at bíligari kvøldtaksturin hjá Føroya Tele byrjar kl. 18.00 meðan hann hjá Sonofon byrjar kl. 19.30, soleiðis at munurin minkar burtur í onki. Tað er stórur munur á, at verða 93 % dýrari og so at hava so at siga somu prísir – helst tá ið talan er um upplýsingar til politiska viðgerð í Løgtinginum.

Viðvíkjandi støðuni í Íslandi hevur Fjarskiftiseftirlitið samanborið tvey ymisk hald, nevniliga dagprísin hjá Landssími Íslands og kvøld – frítíðarprísin hjá TAL (einum øðrum veitari – og harvið eina loysn sum ikki finst, við einum standardhaldi hjá Føroya Tele.

*Kunnu vit ímynda okkum, at man kann fara inn í ein handil og keypa tær líku síðurnar úr Dimmalætting og tær ólíku úr Sosialurin, og so bert gjalda 10,00 kr í staðin fyri 12,00 kr.?*

Føroya Tele hevur bíligari t.d. Vinnuhald, men hesum tykist Fjarskiftisftirlitið ikki at hava áhuga í at nýta í samanberingunum.

Hetta er bert tvey dømir um misvísandi samanberingar í "Støðumyndini" út av mongum.

### Konstruktivur kritikkur og samstarv heldur enn spillandi tungu

Fjarskiftiseftirlitið átti eins og Vinnumálastýrið, at verið errið av gongdini á fjarskiftismarknaðinum í Føroyum. Síðani frælsisgerðingin bleiv sett ígongd í 1997, hevur neyvan nakað land í Evropa flutt seg so skjótt frá einkarrættsstøðu við høgum gjøldum til víttfevnda kapping og hálveraðar prísir, samstundis sum tænastuútboði er á hædd við tey fremstu.

Vandi er fyri, at Fjarskiftiseftirlitið við ikki at vísa nóg stórt skynsemi í teirra regulering og við ikki at veita nóg neyvar og rættvísar upplýsingar, kunnu forkoma einum annars ávegis sunnum kappingarumhvørvi í Føroyum.

### Støðumynd frá Føroya Tele – eitt dømi

Føroya Tele hevur í sínum samstarvi við Fjarskiftiseftirlitið alla tíðuna lagt dentin á, at kapping er góð, eisini fyri Føroya Tele, og at Føroya Tele annars meinar, at hædd alla tíðina skal takast fyri, at føroyski marknaðurin er lítil og harvið, at inntøkugrundarlagið er lítið, hóast íløgukostnaðurin oftani er samanberligur við støðuna í størri londum.

*Kunnu vit samanbera prís / blaðsíðu munin millum føroysku bløðini og so Jyllands-Posten ella New York Times ?*

Niðanfyri er samanbering av prísinum fyri eina 3 minuttir samrøðu á GSM fartelefon kervinum hjá Føroya Tele, samanborið við Danmark (Sonofon), Ísland (Landssími), Noreg (Telenor), Malta (Vodaphone), Jersey (Jersey Telecom), Grønland (Tele Greenland).




Tilsvarandi vísir myndin niðanfyri stovningar- og mánaðargjøldini hjá teimum somu veitarunum.




Sum myndirnar vísa, eru fleiri hættir at samanbera á millum tey ymisku londini og millum veitarir. Avgerðandi er, at eins tænastur verða samanbornar og at samanborið verður við lond, har støðan líkist tí í Føroyum (Malta, Jersey, Ísland og Grønland) ella við lond sum vit fegin vilja samanberast við, t.d. Danmark og Noreg.

Føroya Tele vónar við hesum, at kjaki um fjarskiftisprísir og kapping í Føroyum, kann byggja á eitt breiðari grundarlag og eini meira rættvísa mynd, til gagns fyri allar partar og ikki minnst til gagns fyri viðskiftafólki.